## Reglur um søvn og savnstilfar á Føroyamálsdeildini

**Søvn**

Savnstilfar á Føroyamálsdeildini er varðveitt í hesum savnsformum:

seðlasøvn
kort- og myndasavn
bandasavn
handritasavn
teldugrunnar

Tilfarið í søvnunum hoyrir undir ymisk fakøkir og kann tí skiftast sundur í vísindasøvn. Á deildini eru hesi vísindasøvn:

Orðasavn
(tilfar: seðlasavn, elektroniskt tekstasavn)

Staðanavnasavn
(tilfar: handrit/listar, kort, myndir, seðlasavn, bond, teldugrunnar)

Fólkanavnasavn
(tilfar: teldugrunnar, (seðlasavn))

Málførasavn
(tilfar: bond, kartotek)

Fólkaminnissavn (skaldskapur av manna munni)
(tilfar: handrit, bond)

Bókmentafrøðilig handrit

**Reglur um savnstilfar**

Savnstilfar, sum verður goymt í søvnunum á Føroyamálsdeildini, er - og eigur at verða skrásett sum - ogn hjá deildini og kann ikki verða latið út av deildini. Í serligum førum kunnu avtalur verða gjørdar um, at tilfar, sum onnur eiga, kann verða latið deildini í varðveitslu (deponerað á deildini).

Uttandeildarfólk hava bert atgongd til savnstilfar í samráð við tann, ið hevur ábyrgd av viðkomandi savnsøki, ella við deildarleiðslu, og bert um serligar treytir ikki eru lagdar á, sum forða tí. Hevur uttandeildarfólk fingið loyvi at gera kanningar í tilfari, sum er í søvnunum, skal tað verða gjørt á sjálvari deildini.

Meginreglan er, at kopi av savnstilfari verður ikki latið uttandeildarfólki. Undantøk kunnu verða gjørd, tá ið fólk gera savningararbeiði fyri deildina ella í samarbeiði við deildina og nýtt savnstilfar harvið kann koma deildarsøvnunum til góðar. Avvarðandi savnsleiðari ger avtalur við uttandeildarfólk um samstarv.

Annars kann savnstilfar ikki verða kopierað til uttandeildarfólk, uttan serligar grundir tala fyri tí. Brúkarin eigur tá at senda skrivliga umbøn til deildina, sum tekur avgerð í samráð við savnsleiðara. Deildin kann tó bert ganga við til tílíka kopiering í avmarkaðan mun, og bert í tann mun, deildin hevur arbeiðsorku til tess, og má brúkarin gjalda tað, sum tilfarið kostar.

Samtykt á megindeildarráðsfundi 5.7.2001.
Broyting samtykt á megindeildarráðsfundi 26.11.2001.